

# Væl vitjaður føroyskur básur á oljusøluráðstevnu í London

Deil:

**Jan Müller**

04.12.2014 - 22:38

Oljan.fo

Um miðjan november vóru umboð frá Jarðfeingi við á stóru olju- og søluráðstevnuni PETEX, ið verður hildin annaðhvørt ár í London.Á ráðstevnuni hava umboð fyri almennar oljumyndugleikar í ymsum londum møguleika at vísa á áhugaverd umráði á teirra øki, umframt at tænastuveitarafeløg millum onnur hava møguleika at selja sínar tænastur til oljuvinnuna.

Básurin hjá Føroyum varð væl vitjaður, bæði av olju- og veitarafeløgum. Ráðstevnan vardi í tríggjar dagar.

Umframt at vera til staðar við bási var Jarðfeingi í ár eisini ein av stuðlunum á ráðstevnuni, ið var við at gera Føroyar enn sjónligari.

Kelda: Jarðfeingi